| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. oktober 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 10/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 29. oktober kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 23. oktober 2009 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang (fór av fundinum kl. 18.15 áðrenn mál nr. 53/2009 kom til viðgerðar).
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Bjørghild Arnholdtsdóttir

Gordon Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard, sum heitt hevur á borgarstjóran um at kalla varalimin inn hansara vegna grundað á serligar umstøður.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 50/2009.**

**Viðv. vali av bólki undir "Arbeiðsbólki framtíðar skúlaskapur í kommununi".**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 12. apríl 2007 og aftur í sambandi við skipan tann 29. Desember 2008 valt ein arbeiðsbólk at arbeiða við framtíðar skúlaskapi í kommununi.
Hesin bólkur er mannaður við umboðum bæði fyri skúlaverk, sosiala økið og eisini býráðspolikikarum, og hava fleiri fundir verið í bólkinum, temadagur hildin á Gjáargarði, somuleiðis sum hesin eisini hevur verið á vitjan á nýggju skúlunum bæði í Runavík og í Hoyvík.
Forkvinnan í nevndini Kristina Toftegaard Larsen metir, at arbeiðið hjá hesum bólki er so mikið áleiðis komið, at settur eigur at verða ein minni bólkur úr størra arbeiðsbólkinum, sum skal verða við til at skriva álit í málinum, sum latið skal verðað latið sjálvum arbeiðsbólkinum, sum síðan letur arbeiðið sambært arbeiðssetningin víðari til mentamálanevndina.
Sjálvt arbeiðið við at savna neyðugt tilfar frá fundum í arbeiðsbólkinum krevur, at settur verður ein skrivari burturav til at taka sær av hesum arbeiðið fyri minna arbeiðsbólkin við at skriva álit í málinum. Í hesum sambandi skal verða upplýst, at býráðsskrivarin hevur boðað frá, at hann ikki hevur stundir til at gera arbeiðið. Tí hevur forkvinnan tosað við Kristian Martin Peteresn, formann í Skúlastýrinum um at taka sær av skrivarauppgávuni, og hevur hann játtað hesum.
Forkvinnan mælir til yvir fyri mentamálanevndini at hesir limir verða valdir í undirbólkin:

- Vagn Foldbo, skúlastjóra við Fuglafjarðar skúla
- Maria Eldevig, forkvinnu í Námsfrøðisliga Ráðnum við Fuglafjarðar skúla
- Kristina Toftegaard Larsen, forkvinnu í mentamálanevnd býráðsins

Somuleiðis mælir hon til, at Kristian Martin Petersen, formaður í skúlastýrinum við Fuglafjarðar skúla verður skrivari og sostatt kemur at skriva álitið um "Framtíðar skúlaskap í kommununi".

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 21. Oktober 2009 og mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum um at velja omanfyri standandi limir í undirbólkin, somuleiðis sum nevndin eisini mælir til, at Kristian Martin Petersen verður skrivari hjá bólkinum við at taka samanum tilfarið, ið fyriliggur, og at skriva álit.
Neyðug peningajáttan til skrivaraarbeiði er á konto undir bólki 4 "Skúllin nýíløgur" nr. 4232253110.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0). Somuleiðis varð samtykt at avtaka arbeiðsbólkin, sum valdur varð av býráðnum í sambandi við skipanina tann 29. Desember 2009 og velja bólkin av nýggjum við niðan fyri standandi limum (9.-0):

- Kristinu Toftegaard Larsen forkvinnu í mentamálanevndini
- Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra
- Eyðun á Lakjuni, formann í teknisku nevndini
- Elisabeth D. Eldevig, forkvinnu í sosialu nevndini

- Bjørghild Arnholdtsdóttir, býráðslim fyri Sonna á Horni, sum verður limur í bólkinum, tá ið hann tekur sæti aftur í býráðnum.
- Kristian Martin Petersen, formann í Skúlastýrinum
- Pætur Joensen, býarverkfrøðing
- Irenu Olsen, leiðara á sosialu deildini
- Jógvan Philbrow, leiðara í Frítíðarskúlanum
- Vagn Foldbo, skúlastjóra
- Mariu Eldevig fyri Námsfrøðisliga ráðið

**<u>Mál nr. 51/2009.</u>**

**Viðvíkjandi vali av varalimi í barnaverndarnevndina fyri Dianu Hansen.**

Í sambandi við at Herdis Nybo Justesen, forkvinna á barnaverndarnevndini tann 01. oktober 2009 er flutt til Eysturkommunu, so hevur varalimur hennara Diana Hansen tann 15. oktober 2009 tikið sæti sum fastur limur í barnaverndarnevndini valskeiðið út, t.v.s. fram til 31. desember 2012.

Hesi viðurskifti føra so við sær, at nýggjur varalimur skal verða valdur fyri Diana Hansen, somuleiðis sum barnaverndarnevndin skal skipa seg við nýggjum formanni/forkvinnu.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið um varalim á fundi tann 19. oktober 2009, og varð avgerð tikin um, at forkvinnan í nevndini Elisabeth D. Eldevig skuldi tosa við 3 persónar, sum vórðu í uppskoti á fundinum.

Við telduposti til undirritaða og leiðaran av sosialu deildini tann 23. oktober 2009 kl. 08.13 verður boðar Elisabeth frá, at ***Jón Simonsen***, Bjarnavegur 26, 530 Fuglafjørður, hevur takka ja at verða varalimur.

Sostatt verður omanfyri nevndi skotin upp sum varalimur í barnaverndarnevndina fyri Dianu Hansen valskeiðið út.

**Avgerð:**
Tilmæli frá sosialu nevndini varð samtykt. (9-0). Sostatt verður Jón Simonsen varalimur í barnaverndarnevndini valskeiðið út fyri Diana Hansen.

**<u>Mál nr. 52/2009.</u>**

**Viðvíkjandi broytan av Stuðulspolitikkinum í Fuglafjarðar kommunu.**

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 15. januar 2009 viðgjørt broyting av KAP 10 § 27, sum sambært góðkenning býráðsins frá 24. apríl 2008 sum sigur: "Fyri hvønn næming í miðnámsflokkunum ella á hægri lærustovni, sum er bústiandi í kommuni, kann ein upphædd áljóðandi kr. 1.000,00 verða latin í sambandi við utttanlandsferð".

Nevndin varð á fundinum samd um at mæla býráðnum til, at § 27 í "Stuðulspolitikkinum fyri Fuglafjarðar kommunu" verður broytt soleiðis, at ítróttarfólk, ið fara uttanlands fáa eisini stuðul áljóðandi kr. 500,00 fyri persónin og miðnámsflokkanæmingar ella lesandi á hægri lærustovni, fara úr kr. 1.000,00 fyri hvønn persón niður í kr. 500,00, eins og teir í § 26 nevndu næmingar 1.-10. flokk.

Grundin til at málið verður lagt fyri býráðið nú er, at nevndin hevur lagt til merkis, at nevnda álit als ikki er latið býráðnum eftir viðgerðina tíverri.

Borgarstjórin tók á býráðsfundi 24. September 2009 avgerð um at taka málið av skránni og beina málið aftur í mentamálanevndina til víðari viðgerðar, grundað á at býráðslimir ikki vórðu á einum máli um at lækka stuðulin til miðnámsnæmingar ella hægri lesandi úr kr. 1.000,00 niður í kr. 500,00.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið aftur á fundi 21. Oktober 2009, og mælir nevndin býráðnum til at halda fast við uppruna tilmæli frá nevndini frá 15. Januar 2009.

**Avgerð:**
Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskot frá Dánjali Vang um at halda fast við, at stuðulin til l miðnámsnæmingar ella hægri lesandi verður sami sum higartil kr. 1.000,00. Uppskotið fall (2 atkv. fyri, 6 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Ímóti atkvøddu Elisabeth D. Eldevig, Kristina T. Larsen, Bjørghild Arnholdtsdóttir, Magnus Midjord, Petur Abrahamsen og Gordon M. Petersen. Blankt atkvøddi Eyðun á Lakjuni).

Tilmælið frá mentamálanevndini varð samtykt. ( 7 atkv. fyri, 1 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Ímóti atkvøddi Dánjal Vang, blankt atkvøddi Sigurð S. Simonsen).

**<u>Mál nr. 52/2009.</u>**

**Viðvíkjandi umsorgaranarbeiðinum í Luffustovu.**

Grundað á at Almannastovan hevur tikið avgerð um at avtaka stuðulin til umsorganararbeiði, verður kommunan noydd til at hugsa um, hvørji tilboð kunnu verða til tey eldru í býnum.

Neyðugur peningur er avsettur á endurskoðaðu fíggjarætlanini fyri kommununa fyri fíggjarárið 2009 frá 25. juni 2009.

Sosiala nevndin leggur dent á, at tiltøkini hjá teimum eldru halda áfram, og at kommunan finnur eina loysn saman við eldrafelagnum Borgini, sum annars eigur hølir, sum tey dagliga nýta, somuleiðis sum nevndin fyri eldrafelagið er áhugað fyri, at kommunan flytur ítrivið, sum er í Luffustovu, yvir í lonina.

Eldrafelagið Borgin hevur verið á fundi við sosialu nevndina, sum kom við uppskoti um, hvussu kommunan fíggjarliga kann stuðla eldrafelagnum Borgini restina av árinum. Tað verður neyðugt at samstarva á økinum og leggja arbeiðið í Luffustovu saman við arbeiðinum í Lonini.

Uppskotið er at útgjalda kr. 55.000,00 til Borgina, sum er beinleiðis stuðul, sum kommunan hevur avsett á síni fíggjarætlan fyri 2009. Síðan hevur nevndin tikið avgerð um at flyta tiltøkini í Luffustovu til Lonina, har eldrafelagið Borgin fær kr. 45.000,00 aftrat teimum klr. 55.000,00, tað sum eftir er av árinum fyri aktiveringina.

Nevndin í eldrafelagnum samtykti á fundi 16. juni 2009, at tey vilja átaka sær hesa uppgávu fyri stuðul kr. 45.000,00 restina av árinum 2009. Kommunan kann síðan seta pening av á fíggjarætlanini fyri 2010, sum eldrafelagið kann søkja um eftir umsókn.

Sosiala nevndin hevur viðgjørt málið um umsorganararbeiði á fundi tann 24. august 2009, og mælir býráðnum til at taka undir við at flyta umsorganararbeiðið úr Luffustovu til hølini í Lonini, sum eldrafelagið Borgin eigur. Eftir fyriliggjandi er eldrafelagið Borgin áhugað í at taka sær av hesum arbeiði.

Borgarstjórin tók málið av dagskrá á býráðsfundi tann 24. September 2009 eftir áheitan frá forkvinnuni í sosialu nevndini, við tað at málið tíverri ikki varð búgvið til støðutakan.

Grundgevingin fyri avgerðini varð, at sosiala nevndin hevði gjørt avtalu við nevndina fyri eldrafelagið Borgina um framyvir at taka sær av aktiveringini, sum lýst omanfyri, og at henda sostatt varð flutt úr Luffustovu í Felagslonina.

Hesi viðurskifti komu at føra við sær, at frá at verða eitt kommunalt tilboð um dagtilhald kom tað framyvir at verða eitt privat tilboð frá eldrafelagnum. Tá verður bert talan um eina aktivering av eldri og ikki tvær.

Men tíverri metti nevndin seg ikki føra fyri júst nú at taka sær av aktiveringini.

Nevndin í eldrafelagnum hevði annars skilt avtaluna við kommununa á tann hátt, at tey skulu fáa kr. 15.000,00 um mánaðan fyri leigu av hølum vm, meðan kommunan sjálv kemur at rinda lønir til aktiveringsfólk.

Málið varð til umrøðu á fundi í sosialu nevndini tann 19. oktober 2009, men varð eingin niðurstøða gjørd, við tað at forkvinnan í nevndini aftur skuldi tosað við nevndina fyri eldrafelagið.

Nevndin varð tó samd um, at dagtilhaldið eigur at lata upp skjótast undir einum ella øðrum formi privatum ella kommunalum ella kombinatión av báðum, við tað at umleið 1 mánaður er gingin, síðan dagtilhaldið fyri pensjónistar vanliga eigur at lata upp.

Forkvinnan í sosialu nevndini hevur ídag tosað við Rosmundu Joensen, forkvinnu í nevndini fyri eldrafelagið og Hannu Neshamar, leiðara av dagtilhaldinum.

Treytað av góðkenning býráðsins er avtala gjørd við eldrafelagið um, at kommunan kemur at rinda kr. 4.000,00 um mánaðan fyri leigu av felagslonini, somuleiðis sum avtala eisini er gjørd við Honnu um, at arbeiðsfólkið í aktiveringini halda fram (Hanna Neshamar, Anna Berjastein og Rigmor Toftegaard), og at kommunan kemur at rinda lønir og møguligar útreiðslur beinleiðis fram fyribils til 31. desember 2009.

Viðurskiftini komandi ár í sambandi við aktiveringina verða tikin upp í sambandi við viðgerð av fíggjarætlan kommununar fyri 2010.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá forkvinnuni í sosialu nevndini um, at umsorganararbeiðið rsetina av inniverandi fíggjarári verður í felagslonini, og at kommunan rindar

Eldrafelagnum Borgini kr. 4.000,00 um mánaðan í leigu, og at kommunan rindar lønarútreiðslur og møguligar aðrar útreiðslur í hesum tíðarskeiði. (9-0)

Somuleiðis varð samtykt, at viðurskiftini framyvir verða tikin upp til viðgerðar í samband við viðgerð av fíggjarætlan kommununar fyri 2010. (9-0).

**Mál nr. 53/2009.**

**Uppskot til avtalu við P/F Havsbrún um rávørugjald av ídnaðarfiski.**

Vísandi til fund millum leiðsluna við Havsbrún og býráðsleiðsluna tann 06. oktober 2009, so hevur kommunan tann 15. oktober 2009 sent Havsbrún uppskot til avtalu í sambandi við ásetta rávørugjaldið av ídnaðarfiski upp á 0,75% av landingarvirðinum, sum ásett varð av býráðnum í november 2007, og av havnanevndini 12. desember 2007 við gildiskomu tann 01. januar 2008.

Somuleiðis verður eisini víst til gjaldskránna fyri gjøldum til Fuglafjarðar havn, sum býráðið endaliga samtykti á fundi 05. mai 2009 at galda frá 01. mai 2009 til 30. apríl 2013.

Á fundinum partanna millum varð avtalað, at býráðsleiðslan skuldi kanna um nakar møguleiki varð fyri at finna okkurt viðurlag (kompensjtión) fyri ásetta rávørugjaldið, og aftaná at hava loddað dýpið í politiska baklandinum verður mett, at møguleiki er fyri at "Avtalan" kann verða góðtikin og staðfest í býráðnum.

Heitt verður annars í skrivinum á Havsbrún um at svara kommununi aftur innan mikudagin 21. oktober 2009, soleiðis at málið kann verða lagt fyri fyrstkomandi býráðsfund.

Við skrivi, dagfestum 20. oktober 2009 takkar Havsbrún fyri fundin 6. oktober 2009 og bræv kommununar, dagfest 15. oktober 2009. Til skrivið er at siga at hetta verður mett sum eitt stórmál fyri Havsbrún, har gamlar avtalur og gomul siðvenja verða broyttar munandi (teirra sitat). Virkið má konsekvensrokna broytingarnar og koma við møguligum broytingaruppskoti, og síðan leggja málið fyri nevndina. Arbeitt verður við málinum og verður vent aftur skjótast til ber væntandi seinast í viku 43 ella fyrru helvt av viku 44.

Staðfest er, at kommunan pr. d.d. einki skriv hevur móttikið frá Havsbrún í málinum.

*Uppskotið til avtalu er hetta:*

1. Ásetta rávørugjaldið fyri ídnaðarfisk verður óbroytt galdandi frá 01. Januar 2008.
2. Ógoldið rávørugjald fyri 2008 verður goldið innan 5 dagar eftir, at henda avtala er undirskrivað partanna millum, meðan rávørugjaldið fyri 2009 verður goldið Fuglafjarðar kommunu (havn) áðrenn ársenda 2009.
3. Treytað av at rávørugjaldið fyri 2008 er goldið sambært pkt. 2, fer avtalan millum Fuglafjarðar havn og P/F Havsbrún frá 24. apríl 1987 um vørugjald fyri mjøl og lýsi, sum flutt verður eftir vegakervinum, úr gildi sambært § 4 við 3 mánaðar fráboðan. Um semja er, kann avtalan verða sett úr gildi tann 31. desember 2009.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum kommununa og Havsbrún. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.45.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Bjørghild Arnholdtsdóttir

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen